# Halda fram at okra útjaðaran



HERGEIR NIELSEN

Uppskot okkara um at javnseta flutningskostnaðin um Suðuroyar-. Skopunar- og Kallsoyarfjørð við flutningskostnaðin undir Vestmannasundi og Leirvíksfirði fekk góða umrøðu á tingi í 3½ tíma langa orðaskiftinum undir fyrstu viðgerð.

Men har endaði vælvildin so eisini.

Komnir aftur úr rættarnevndini mæla menn frá at samtykkja uppskotið, og siga júst so sum teir plaga, at einki ber til.

Heilgarderingin er, at tað heldur ikki ber til tekniskt at gjøgnumføra uppskotið í verandi líki, og at landsstýrismaðurin eigur at arbeiða ítøkiliga við eini ætlan á økinum og leggja eina frágreiðing fyri Løgtingið til umrøðu.

Einki er meira burturvið enn tað sama.

Uppskotið varð tilevnað í samstarvi við løgfrøðiligu ráðgevingina á løgtingsskrivstovuni, so tann parturin er sjálvandi í lagi.

Sjálvandi er tekniski parturin eisini í lagi, og halda teir seg ikki til at umsita skipaninia, so kunna vit saktans gera tað fyri teir úti um landið.

Sjálvandi er ikki skuggin av tekniskum forðingum í at krevja inn tær upphæddir, ið kravdar verða aðrastaðni, og at landsstýrismaðurin eigur at arbeiða við málinum hava vit hoyrt seinasta mansaldurin og reiðiliga tað.

Alt bendir sostatt á, at vit á ferjuleiðunum um Suðuroyar-. Skopunar- og Kallsoyarfjørð framhaldandi verða okraði í gjøldum út tveimum upp í fimmogtjúgu ferðir kostnaðin um landføstu sambondini.

Somuleiðis bendir alt á, at vit eisini framhaldandi við jøvnum millumbilum fara at hoyra um Suðuroyarloysnir og annað tílíkt, og ivaleyst fara hesar loysnir at hvørva undir havsbrúnni eins ofta tær koma undan.

Fríggjadagin kl. 10 løða teir kanónirnar, og enn eitt uppskot av mongum til bata fyri kappingarførið í tí skjótt hvørvandi útjaðaranum verður skotið niður.

# Als ikki láturligt at skilja millum religión og politikk



FIROUZ GAINI

Í stórari áhugaverdari samrøðu í Sosialinum (17. november), sigur Rúni Rasmussen, júst afturkomin av evangeliskari møtirøð í Kenya, at tað er láturligt at royna at skilja sundur religión og politikk. Hetta havi eg mangan hoyrt áður. Men tað er fyrstu ferð eg hoyri tað frá persóni, ið undirvísir í stjórnmálafrøði á einum universiteti (t.v.s. einum universiteti, ið ikki hevur beinleiðis tilknýti til nakra trúargrein).

Rúni sigur, at tað er ógjørligt at skilja átrúnað og politikk sundur, tí at virðir og moralur eru í øllum politikki. Jú – men virðir eru ikki altíð knýtt at religión. Persónar, ið ikki ynskja at blanda politikk og religión saman, hava ikki færri ella veikari virðir enn onnur fólk. Sjálvandi verða øll fólk ávirkað av sínari bakgrund (etnisku, sosialu, mentanarligu, religiøsu o.s.fr.), men tað merkir ikki at hesi viðurskifti stýra allar tær politisku metingarnar og raðfestingarnar hjá fólkinum. So einfaldur er veruleikin – tíbetur – ikki. Fólk flest hava evni til at skilja, at øll ikki hava somu religiøsu/mentanarligu virðir, tó somu rættindi í tí modernaða statinum.

Rúni sigur, at kristindómurin hevur givið okkum fólkaræði og mannarættindi. Hetta hoyrist eisini mangan, men verður sjáldan kannað nærri. Evropeiska fólkaræðið hevur sínar røtur í hellenistiska mentanarheiminum, ið var sterkt ávirkaður av eldri sivilisasjónum í tí eystara partinum av Miðjarhavsøkinum – t.d. Egyptalandi og Fønikia. Hvørki kristindómurin ella fólkaræðið uppstóðu í nøkrum tómrúmi. Tey hava djúpar søguligar røtur.

Trúgvin skal síggjast, sigur Rúni, sum slóðari fyri frambrotum í Evropa. Tað eru nógvar ymiskar meiningar um hetta. Hvussu nógvar milliónir fólk eru ikki fallin í religiøsum atsóknum og kríggjum seinastu 2000 árini? Hvussu nógv diktatur hava ikki brúkt religiónina sum vápn at kúga fólk við? Tann modernaði staturin, ið franska kollveltingin og ídnaðarkollveltingin vóru við til at skapa, umboðaði eina umfatandi uppgerð ímóti religiøsari fanatismu, ið hevði verið ráðandi í Evropa í fleiri øldir.

Upplýsingartíðin eigur æruna fyri, at samfeløgini mentust og borgararnir fingu størri rættindi. Tann modernaði staturin verjir borgararnar í landinum, óansæð trúgv, húðarlit, mentan, sexuella orientering, etnisitet, o.s.fr. Her noyðast politikarar at royna at seta seg í støðuna hjá øllum bólkum í samfelagnum, teir noyðast at hugsa um heildina, og ikki eins um seg og síni nærmastu.

Rúni sigur, at "dúgliga verður kravt av kristnum politikarum at leggja sína lívsáskoðan eftir heima við hús, tá teir fara í arbeiðsklæðini". Tað er ikki rætt. Mær vitandi eru so gott sum allir politikarar okkara kristnir, hóast nakrir teirra kanska tykjast sum "verðsligir humanistar" tá teir tala. Tað ber væl til at vera kristin politikari uttan at royna at finna eitt svar til allar politiskar spurningar í bíbliuna. Um tað bara var "eitt" svar ("eina" loysn) til hvønn spurning, so kundu vit tað sama stongt tingið og lisið skriftina. So var kjak óneyðugt. Demokrati og teokrati kunnu ikki sameinast. Og vit kunnu ikki velja bæði í senn. Tað er als ikki láturligt at skilja millum religión og politikk.

*Kvøldseta í Tilhaldinum 24. november 2006 kl 16.30*

## Regin Dahl (f.1918)

***Yrkingar - løg - hugleiðing***

*Jákup Lindenskov bjóðar vælkomin*

**Skrá:**

| | |
|---|---|
| Felagssangur: | *Ein gomul kista av kamfertræ*<br>orð: Hans Andreas Djurhuus, lag: Regin Dahl |
| Høgni Joensen: | Listamaðurin Regin Dahl |
| Sólva Jónsdóttir: | *Tøkk* - yrking frá 1937 |
| Hjørdis Trónd: | *Í advent* - yrking frá 1955 |
| Eyrith Leyni: | Brot úr hugleiðingini *Myndir* frá 1939 |
| Bjørg Jensen og Herluf Lützen: | *Katrin I* - orð: Hans Andreas Djurhuus, lag: Regin Dahl |
| Tóri í Hoyvík: | *Vit eru menn* - yrking frá 1937 |
| Fía Norðberg: | *Vit høvdu klandrast* - yrking frá 1944 |
| Gunhild V. Michelsen og Herluf Lützen: | *Katrin II* - orð: Hans Andreas Djurhuus, lag: Regin Dahl |
| Sólva Jónsdóttir: | *Dóttirin* - yrking frá 1965 |
| Hjørdis Trónd: | *Sálmur* - yrking frá 1955 |
| Birgir Djurhuus, Heini Mortensen og Heini Lützen: | *Pætur á Brekku* - orð: Hans Andreas Djurhuus, lag: Regin Dahl |
| Høgni Lützen: | Brot úr hugleiðingini *Myndir* frá 1939 |
| Felagssangur: | *Meg minnist, tá eg var lítil -*<br>orð: Hans Andreas Djurhuus, lag: Regin Dahl<br><br>við flygli: Benny Samuelsen |

*Fyriskipað og lagt til rættis:* *Lesibólkurin hjá Havnar Sjónleikarfelag*
*Takk til:* *Linu Larsen, Biritu Mohr og Oddvá Nattestad*


